DAGSINS MEINING

Fleiri kvinnur upp í politikk

Hóast umbo› fyri serstakliga kvinnufeløg og felagsskapir fer› eftir fer› og serliga uppundir val til kommunust‡ri og løgting royna at fáa fleiri kvinnur vi› á listarnar, so gongst illa vi› at fáa mansdominera›u listarnar at h‡sa fleiri kvinnum. Hetta hevur nógv vi› gamla vanahugsan og tradition at gera. Samfelagi› hevur ilt vi› at taka kvinnur í t‡andi rá›, st‡ri og feløg, nú hesi nærum altí› hava veri› ábyrgdarøki hjá monnum. At kvinnur eisini sjálvar hava gjørt ov líti› burtur úr at stu›la kvinnum hevur so eisini gjørt sítt til, at ta› er so torført at broyta hetta ójavna og óhepna mynstur. Javnstø›ulógin fer so at gera sítt til at bøta um hetta. Ta› eru so tey, sum siga, at fyri at koma á ting, so skal tú ikki bara ver›a vald, tí tú er kvinna. Spurningurin er um ikki hesin hugsanharátturin er vor›in avolda›ur. Tí eitthvørt ting, sum tekur t‡andi avger›ir um samfelagslig vi›urskifti, um vi›urskifti, sum vi›víkja okkum øllum, eigur at ver›a javnt umbo›a› av kvinnum og monnum. Og tá henda javnvág er so út av lagi, eiga kvinnur at ver›a valdar nettupp tí tær eru kvinnur.

Vit síggja eisini, at har kvinnur koma framat í politikki, ver›ur nógv størri áhugi s‡ndur t‡andi samfelagsmálum , sum mannfólkini í politikki kanska ikki hava nógv gó›a bakgrund at taka upp ella ikki hava áhuga fyri. Her eru ta› ikki minst so t‡›andi vir›i sum familjuspurningar, spurningar um okkara børn, um tey gomlu og sjúku osfr. Ja í veruleikanum sjálv lívæ›rin í samfelagnum. Spurningurin er um ikki vinnulívsmál, sum manssamfelagi› brúkar mestu orkuna uppá at vi›gera, eiga ov stóran part av samfelagstjakinum! Vit skulu sjálvandi ikki undirmeta t‡dningin vinnulívi› hevur, men ta› má ikki vera so, at øll onnur t‡›andi vir›i í samfelagnum, ver›a undirprioritera› av hesi orsøk. Og ein máti at bøta um hetta er rætt og slætt at fáa kvinnur upp í politikk og her hugsa vit ikki minst um komandi løgtingsval. Allir flokkar, sum eru at sær komnir, áttu at kappast um at fáa kvinnur á komandi listar til løgtingsvali› um gott og væl eitt ár. Seinastu tí›ina hava álvarslig mál veri› til vi›ger›ar á tingi og í mi›lunum. Eitt nú spurningurin um kynsligt misbrúk av børnum, har›skapur móti børnum osfr. At slík mál koma fram nú kunnu vit takka kvinnum í politikki og uttan fyri politikk fyri. Eftir okkara tykki høvdu slík álvarslig og so t‡›andi mál veri› prioritera› nógv hægri í politiska or›askiftinum og arbei›inum, um fleiri kvinnur vóru vi› í hesi vi›ger›. Lati› okkum nú síggja, hvussu flokkarnir fara at handfara hetta máli› til komandi val. Ta› átti at veri› ein styrki fyri tann flokk, sum ítøkiliga og mi›víst fer undir at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Marius Absalonsen 90 ár

Marius Absalonsen í Vági fylti 90 ár 1. desember. Marius er slekta›ur av Vi›arei›i. Hann hev›i 9 systkin, men bert átta ára gamal misti hann pápan og tveir brø›ur. Hetta merkti allan uppvøksturin. Eftir vanlukkuna flutti Marius til farbró›ur sín á Heygum.

Lívsstarv sítt hev›i Marius á sjónum. 13 ára gamal gjørdist hann útró›rarma›ur, og 15 ára gamal fór hann til skips. Seinni fór hann uppá skúla, og fekk sjómansskúla í Danmark.

Konu síni, Fridu, møtti Marius tá hann sigldi úti, og hon var arbei›skona í Keypmannahavn. Frida doy›i í fjør eftir drúgva sjúkralegu.

Marius sigldi krígsárini, og í bókini "Teir bóru bo› í b‡", sum hann gav út í 1980, grei›ir hann m.a. frá síni hættisligastu vandafer›: Hann var skipari á dampskipinum Sildberanum, og teir lógu beint nor›an fyri Skagen á veg til Føroya, tá Danmark var› hersett av t‡skarum tann 9. apríl 1940. Eitt minubelti› var› lagt út í Skagerak, og fleiri skip fórust av minum tann dagin. Eisini hoyrdu teir eitt sjóslag stutt hagani teir vóru.

Marius grei›ir í bókini frá at hann helt skipsrá› - t. e. at hann læt manningina taka avger›ina, tí "eg helt ikki at eg einsamallur hev›i rætt til at taka avger› fyri allar í hesum føri", sum hann sigur í bókini. Manningin avgjørdi at halda lei›ina til Føroya - ígjøgnum minubelti›.

Marius helt fram at sigla eisini eftir kríggi›, men seinni gjørdist hann heimama›ur, og starva›i m.a. sum vrakari. Marius og Frida fingu seks børn.

Honum hevur dáma› væl at fingist vi› sey›, og til fyri fáum árum sí›ani hev›i hann sína dagligu gongd "nor›uri í Dal" í Vági, har familjan eigur eina trø›.

Men Marius livir framvegis vi› sítt fríska lív, bæ›i til likams og sálar. So seint sum í summar sást hann standa vi› pensli og hampa sær húsini.

Marius hevur altí› veri› gudrøkin ma›ur, og hann hevur ver›i virkin innan brø›rasamkomuna sí›ani hann var ungur drongur. Hann hevur veri› ein av høvu›sstu›lunum í Bethel í Vági í eitt mannaminni, og hevur skriva› fleiri kristilig smárit. Hann hevur eisini yrkt sálmar, og onkur teirra ver›ur nógv sungin í brø›rasamkomuni.

Hóast einkjuma›ur og høgan aldur er Marius Absalonsen bjartskygdari og lættari í huga enn tey flestu. Hetta sinnalag hevur eisini samband vi› gudstrúnna, og ver›ur kanska best l‡st í einum av hansara egnu sálmum:

Gó›i Gud, eg takki tær
fyri heimi› uppi har,
sum tú okkum nú í ná›i gert
í stand.
synd og sorg er ikki meir,
eingin eldist eingin doyr.
Eingin døpur mynd skal
myrkja lívsins land.

60 ár

Fríggjadagin 1. december fylti Johild Joensen á Oyri 60 ár.

Johild er fødd á Ei›i og giftist í 1962 til Oyrar vi› Christiani Joensen. Tey eiga fimm børn. Jógvan, Lis, Allan, Unn og Marnu.

Christian var í nógv ár skipari á skipunum hjá O C Joensen, Poppy og Nor›heim, sum hava fiska› skeljar til Skeljavirki›.

Johild hevur eisini havt naka› vi› skeljar at gera. Hon arbei›ir vanliga á Skeljavirkinum, ta tí›ina arbei›i er har. Ta› hevur hon gjørt nú í 20 ár.

Annars er hon heima, har hon eisini hevur ríkiligt at taka í.

Bóndahús er, og ta›, sum har til hoyrir krevur sítt. Nú hevur sonurin fest, men ikki hevur Johild slept øllum solei›is kortini.

Væl dámar henni náttúruna. Og ta› eru ikki bara sey›ur, dunnur og gæs. Nei, blómurnar eru ta›, henni dámar serliga væl.

Og hóast ivaleyst er at taka í, fær hon kortini tí› til frítí›arítriv. Fyrst og fremst er ta› handarbei›i› heima, henni dámar væl. Situr mangan vi› stokkum ella nál og trá›i, sum nú kanska serliga tey sjey ommubørnini njóta gott av. Ikki tí. Ta› er tó ikki bara heima, hon trívur í handarbei›i›. Hon gongur eisini í kvøldskúla fyri at kunna seg meira um ta› handaliga.

Men eisini a›rasta›ni brúkar hon sína frítí›. Solei›is er hon nevndarlimur í ungmannafelagnum í sóknini, Eydnuni. Og í nevndini fyri sjómanskvinnuringin hevur hon eisini siti›.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Tilbo›ini kunnu vera misvísandi



Toyndirnar av at bjó›a út umvælingararbei›i hjá Strandfer›sluni eru ymiskar og ikki bara gó›ar, siga stjórin og tekniski lei›arin á stovninum

Lei›slan á Strandfer›sluni sigur, at royndirnar av at bjó›a út størri umvælingararbei›i stundum eru vánaligar

ÚTBJÓ‹INGAR
Ey›un Klakstein

Ta› er fleiri fer›ir komi› fyri, at alt ov lág tilbo› ver›a latin fyri at fáa umvælingararbei›i hjá Strandfer›sluni.

Hetta sigur lei›slan á Strandfaraskipum Landsins, sum í gjár almannagjørdi eitt skriv um útbjó›ingar hjá Strandfer›sluni.

Reidar Nónfjall, stjóri, og Magnus Magnussen, tekniskur lei›ari, hava or›a› skrivi›, sum er gjørt eftir at kjak hevur veri› um ymisk umvælingararbei›i hjá Strandfer›sluni.

Teir siga, at royndirnar av at bjó›a út umvælingararbei›i hjá Strandfer›sluni eru ymiskar og ikki bara gó›ar.

Nógv d‡rari

Lei›slan á Strandfer›sluni tekur fram dømi um umvæling av Másanum, sum var› gjørt í 1998.

Tilbo›i› upp á arbei›i› var 300.000 krónur, men tá arbei›i› var li›ugt, ljó›a›i rokningin upp á 1,2 milliónir.

– Ta› er ógjørligt at gera eina kostna›armeting og geva bindandi tilbo› upp á størri arbei›i, og serliga ikki um talan er um eldri skip, siga Reidar Nónfjall og Magnus Magnussen í skrivinum.

– Másin er eitt dømi um, at ta› í fleiri før›um ver›a senda ov lág tilbo› fyri at fáa arbei›i. Ella er ta› heilt einfalt ikki gjørligt at geva tilbo›, uttan at alt ver›ur tiki› sundir, so at t‡›uliga sæst, hvat ta› er, sum tilbo› ver›ur givi› uppá.

Reidar Nónfjall og Magnus Magnussen siga, at ætlanin vi› teirra skrivi er at koma vi› einum ískoyti til kjaki› um útbjó›ingar og umvælingararbei›i hjá Strandfer›sluni.

Ógrunda› ónøgd

Lei›slan á Strandfer›sluni heldur, at ónøgdin vi› Strandfer›sluna, tá talan er um umvælingararbei›i, er ógrunda›.

Vi›urskiftini í Føroyum gera, at stundum er lítil kapping, tí feløgini eru fá, og øll hava til dømis ikki somu møguleikar at taka skip upp.

Tveir løgmanssynir í bygdará›i›

Ta› ver›a fimm mannfólk, sum fara at manna n‡ggja bygdará›i› á Vi›arei›i. Seinast vóru tvær kvinnur valdar

VI‹AREI‹I
Ey›un Klakstein

Tveir av n‡ggju limunum í bygdará›num á Vi›arei›i hava Kallsberg til eftirnavn.

Hans Jákup og Kári Kallsberg eru bá›ir synir hjá løgmanni, Annfinni Kallsberg, og teir bá›ir vera næstu f‡ra árini tveir av teimum tilsamans fimm limunum í bygdará›num.

Tríggir listar vóru til bygdará›svali› á Vi›arei›i, har 206 fólk høvdu valrætt. Av teimum vóru 174 – ta› eru 85 prosent – á vali.

Fimm mans fara næstu f‡ra árini at manna bygdará›i› á Vi›arei›i. Seinast vóru tvær kvinnur valdar

Tey kosnu

Á lista A var bygdará›sforma›urin farnu árini, Jógvan Nybo, sum fekk nógv flestu atkvø›urnar á valinum. Hann fekk 62 atkvø›ur, sum er 40 atkvø›ur fleiri enn næsti ma›urin á valinum.

Umframt Jógvan Nybo var› eisini Lyder Sørensen valdur á lista A.

Á lista B var ein ma›ur valdur. Ta› var Árni Absalonsen, sum fekk 16 atkvø›ur.

Á lista C vóru teir bá›ir Hans Jákup og Kári Kallsberg valdir. Teir fingu ávíkavist 19 og 22 atkvø›ur.

Av gamla bygdará›num, er ta› bara Jógvan Nybo, sum heldur fram. Allir hinir f‡ra eru n‡ggir.

Einki konufólk

Í gamla bygdará›num vóru tvær kvinnur valdar, men hesafer› eru ta› bara menn, sum eru valdir.

12 av teimum 27 valevnunum hesafer› vóru kvinnur, men eingin teirra var› vald í bygdrá›i›. Tann kvinnan, sum fekk flest atkvø›ur, fekk tríggjar krossar í sín posa.

N‡ggja bygdará›i› hevur ikki skipa› seg enn.

Ma›ur útidey›ur í Nólsoy

Mánakvøldi› komu fólk í Nólsoy fram á lívleysan mann, sum lá mitt í bygdini.

Bo› vóru send eftir hjálp úr Havn, men einki var at gera. Ma›urin, sum var 62 ára gamal, var dey›ur.

Tá fólk ver›a funnin dey› solei›is, kannar løgreglan altí›, um naka› óvanligt er áfatt. Hetta ver›ur gjørt fyri at sta›festa, um dey›sorsøkin er natúrlig.

Av løgreglustø›ini í Havn ver›ur sagt, at einki bendir á, at dey›sorsøkin ikki er natúrlig.

ek

Ane Læsø farin

SAMFER‹SLA
Ey›un Klakstein

Mánakvøldi› stutt fyri midnátt fór Ane Læsø úr Klaksvík og setti kós aftur ímóti Danmark.

Avloysaraskipi› fyri Dúgvuna hevur farnu vikurnar røkt siglingina millum Klaksvík og Fuglafjør, men nú er leigusáttmálin útgingin.

Tí fer Smyril at gera túrar millum Klaksvík og Havnina hesa vikuna. Onkrir túrar ver›a eisini gjørdir millum Klaksvík og Fuglafjør›.

Umframt Smyril siglir gamla Ternan eftir fer›aætlanini hjá Dúgvuni millum Klaksvík og Lorvík.

Strandfer›slan ætla›i, at Dúgvan skuldi ver›a klár at taka siglingina uppaftur, nú Ane Læse gavst at sigla, men nú roknar Strandfer›slan vi›, at Dúgvan kann fara í sigling aftur fríggjadagin.

Tá er næstan ein mána›i li›in, sí›ani hol kom á Dúgvuna í Lorvík.

Fuglberg til fiskiskap í januar

N‡ggja rækjuskipi› hjá JFK Prawns skal eftir ætlan til fiskiskap fyrst í komandi ári.

Hetta veit Nor›l‡si› at siga í seinastu útgávuni.

Bla›i› sigur, at skipi› skiftir navn frá Polar Nanoq til Fuglberg og fær frámerki KG 135.

Í løtuni er rækjuskipi› til umbyggingar og yvirhálingar á skipasmi›ju í Fredericia. Rokna› ver›ur vi›, at skipi› kemur til Klaksvíkar til jóla.

ek